## Torført at fáa lærarar

Fleiri skúlar høvdu ilt við at seta lærarastørvini, sum vórðu lýst leys í summar. Millum annað var Sandoyar Meginskúli ikki læraramannaður fyrr enn í síðstu løtu, og tað seinasta starvið varð ikki sett fyrr enn nakrar fáar dagar undan fyrsta skúladegi, sigur útvarpið og vísir til eina kanning hjá Skúlablaðnum. Í Mentamálaráðnum ætla tey at geva lærarunum størri møguleika at arbeiða yvir næsta skúlaár, tí tá fáa fyrsti, annar og triði flokkur aftur fleiri tímar.



## Ársfrágreiðing fingið navn

Ársfrágreiðingin hjá Fiskirannsóknarstovuni er nú ársrit og eitur Sjóvarmál. Til 2006 gav Fiskirannsóknarstovan út ársfrágreiðingar, sum lýstu tað farna kalendaraárið, men nú skal ársritið fylgja fiskiárinum ístaðin fyri. Hetta er nú broytt við ritinum Sjóvarmál, sum bæði lýsir virksemið í farna ári, men sum harafturat hevur nýggjasta tilmælið og tøl frá nýggjastu gróðurkanningunum við. Fiskirannsóknarstovan sigur, at ætlandi skal ritið koma út fyrst í september á hvørjum ári, soleiðis at tað kemur at fylgja fiskiárinum heldur enn kalendaraárinum.

# Løgmaður hittir olju- og fíggjarheimin í London



**Jóannes Eidesgaard skal saman við stjóranum á Jarðfeingi og stjóranum í Faroe Petroleum sannføra altjóða oljufeløg og fíggjarheimin í London um tað skilagóða í at gera framtíðar íløgur í oljuvirksemi á okkara leiðum**

OLJA OG FÍGGJARHEIMURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Mikudagin 19. september verður eitt nú føroysk luttøka í oljuvinnuni á skránni, tá oljufelagið Faroe Petroleum bjóðar almennum umboðum og umboðum úr altjóða oljuvinnuni og fíggjarvinnuni til upplýsandi hugnakvøld á føroysku umboðsstovuni í London.

Ætlanin er at seta fokus á oljuleiting og oljuvirksemi á Atlantsmótinum, tvs. bæði á føroyska landgrunninum og í bretskum øki. Millum røðararnar verða Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi og Graham Stewart stjóri í Faroe Petroleum. Tiltakið er fyri innbodnum og pressuni.

Líknandi tiltak varð hildið fyri tveimum árum síðani og ger fram í bygninginum, har eisini danska sendistovan heldur til. Endamálið við tiltakinum skilst er at kunna serstakliga tey, sum arbeiða í stóru fíggjarvinnuni í London um tað, sum fyriferst millum Hetland og Føroyar og hvussu framtíðin sær út á hesum lutvíst nýggja og spennandi leitiøkinum.

Faroe Petroleum, sum eisini hevur íleggjarar bæði í Føroyum og útlandinum, og her serstakliga í Bretlandi, er við í fleiri loyvum bæði í Bretlandi, Noregi og Føroyum. Felagið fer saman við italska ENI at bora ein brunn inni á føroyska landgrunninum, skamt frá markinum, í 2009. Stórar vónir eru til júst henda brunnin. Eisini arbeiðir felagið við at skapa áhuga hjá øðrum oljufeløgum at keypa seg inn í eitt av spennandi loyvunum hjá felagnum á landgrunninum, nevniliga á Wiville Thomsen rygginum sunnan fyri Føroyar. Á henda hátt ruddar felagið eisini slóð fyri, at onnur og nýggj oljufeløg venda eyguni henda vegin og kunnu gerast virkin leitifeløg her í framtíðini.



*Løgmaður fer at geva sítt íkast til at altjóða oljuvinna og fíggjarheimur fara at vísa føroysku oljutilgongdini í framtíðini ans.*



*Sigurð í Jákuppstovu, stjóri á Jarðfeingi fer at greiða frá oljutilgongdini*



*Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroelum fer at lýsa felagið og tess framtíðarætlanir*